# 50 milliónir í rentum fyri undirskotið í 2010

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Eg veit ikki, hvussu nógva orku eg skal brúka til kjakið við Dávid Isfeld, men fari tó at gera nakrar viðmerkingar til hansara seinastu grein, og tað verður helst mítt seinasta íkast til hetta kjakið.

Eg fegnist um, at Dávid Isfeld undirstrikar í sínum aftursvari til mín, at tað vóru føroyingar, og ikki danir, sum høvdu ábyrgdina av kreppuni í 90unum, og eg haldi eisini, at hann má geva mær rætt í tí, at eingin fer á húsagang bara tí at inntøkurnar eru ov stórar. Tí dugir tað ikki at brúka barnsligu undanførsluna, at høvdu inntøkurnar verið minni, so høvdu vit ikki verið "lokkað" at brúkt pengar. Vit mugu undir øllum umstøðum taka ábyrgd av okkara egnu peninganýtslu.

**Ein spurningur um tíð**
Dávid fegnast um, at hóast blokkstuðulin er lækkaður og danir hava minni innlit í føroyskan politikk, so eru vit ikki farin á húsagang, nú globala fíggjarkreppan herjar. Tað er sjálvandi at fegnast um, men samstundis mugu vit ásanna, at við verandi gongd, er tað bara ein spurningur um tíð til húsagangurin rakar.

Hetta minnir ikki sørt um søguna um optimistin, sum datt út av vindeygan-um á sjeyndu hædd. Tað fyrsta, hann hugsaði, var, at hetta fór at enda galið, men tá hann var komin áraka fimtu hædd, byrjaði hann so smátt at fáa mótið aftur, tí tað hevði hóast alt gingið væl higartil.

Vit stýra við fullari ferð beint ímóti einum húsagangi, men enn kunnu vit siga, at tað hevur gingið rímiliga væl higartil.

**Nógvar, smáar yvirtøkur**
Dávid sigur, at føroyingar hava yvirtikið eina rúgvu av málsøkjum síðani kreppuna, og eg skal geva honum rætt í tí, at í tali eru yvirtøkurnar nokkso nógvar, men í týdningi hava tær lítið uppá seg. Nevnast kann, at veðrið er blivið føroyskt, og vit hava eisini sjálvi fingið ábyrgdina av, at eitt kilogramm altíð er eitt kilogramm, og at ein metur veruliga er ein metur. Og so haldi eg, at vitarnir eru eisini farnir at blunka á føroyskum. Men eg haldi ikki, at danir hava mist so nógv vald í Føroyum av teirri orsøk. Eg kann í hvussu so er ikki ímynda mær, at teir høvdu gjørt meturin longri ella styttri, um hetta framvegis lá í teirra valdi.

Tað er ikki rætt, tá Dávid sigur, at ráevni í undirgrundini vórðu yvirtikin aftaná kreppuna. Tann yvirtøkan varð gjørd stutt undan kreppuni, og hini stóru málini vóru yvirtikin, eftir grein 9 í Heimastýrislógini, longu í 70unum.

**Grein 9 yvirtøkurnar**
Dávid sigur, at yvirtøkurnar, sum vórðu framdar í 70unum, vóru ikki veruligar yvirtøkur, og rætt er tað, at málsøkini vórðu ikki formliga yvirtikin. Men tá eg nevndi grein 9 yvirtøkurnar, so var tað fyri at undirstrika, at danir stýrdu ikki hesum málsøkjum aftaná at tey vóru yvirtikin eftir grein 9, og út frá tí segði eg, at danir hava ikki mist ávirkan í Føroyum orsaka av, at grein 9 yvirtøkurnar seinni eru gjørdar til formligar yvirtøkur. Í praksis broyttu tær yvirtøkurnar lítið og einki.

**Tilvildarlig tøl**
Tá eg í míni fyrru grein segði, at Dávid spældi við tilvildarlig tøl, so vóru tað sjálvsagt ikki árstølini, ið vóru tilvildarlig, men heldur tað, at hann samanbar blokkstuðulin við bruttotjóðarúrtøkuna. Eg vísti á, at um hann ístaðin samanbar blokkstuðulin við landskassaúrslitið, sum er nógv meira natúrligt, so bleiv úrslitið heilt nakað annað.

**Tveitt 4 milliardir burtur**
Eg haldi ikki, at eg fari at brúka meira tíð uppá hetta kjakið, tí vit eru og verða helst framhaldandi ósamdir um hesi viðurskiftini.

Líkamikið hvussu nógv ella fá prosent blokkstuðulin er av bruttotjóðarúrtøkuni, so skerst ikki burtur, at fullveldispolitikarar hava tveitt einar 4 milliardir burtur úr einum soltnum landskassa, sum skal gjalda einar 50 milliónir krónur um árið í rentum bara fyri undirskotið í 2010. Tað eru í hvussu so er nógvir pengar fyri ein landskassa, sum hevur beina kós ímóti húsagangi.

# Moralur – Samfelagssinni

ANNFINNUR GARÐALÍÐ

Tað er ikki sørt ein ógvast yvir, hvussu moralur, ella rættari sagt ómoralur, hevur góð gróðrarlíkindi í hesum lítla samfelagum, Føroyar.

Eg hugsi serliga um tær nógvu sparingar, sum verða framdar, at hesar venda rætt, tí givið er, sparingar mugu til, nú undirskotið á fíggjarlógini er so mikið stórt, at tað táttar í eina heila milliard. Leitað verður við luppi og lykt bæði ovarlaga og niðarlaga so finnast kunnu kr. 20,000 her og 40,000 har t.d nakrar krónur fyri heilivág hjá pensiónistum, gevast at stuðla dagtilhaldum, læsa eitt laboratorium o.s.v...

Men tað sum kann øsa og sum øsir okkum fólk upp er, hvussu tingmenn kunna hóreiggja sær, uppá fólkins rokning.

10. sep 2008. Edmund Joensen, løgtingsmaður, fær løn frá Løgtinginum, meðan hann hevur farloyvi haðani, hóast hann hevur løntan varamann á Tingi fyri seg. Edmund Joensen fær meiri enn eina millión um árið fyri sessirnar á Løgtingi og Fólkatingi.

Hóast hann fór í farloyvi við fullari løgtingsløn og ein løntur varamaður tók sæti fyri hann, heldur Edmund Joensen seg megna at røkja bæði størvini. - Tað er ein spurningur um prioritering. Sum sambandsmaður royni eg at binda saman millum Føroyar og Danmark, og við sessi í báðum tingunum kann eg vera eitt bindilið, sigur Edmund Joensen. Meðan Edmund Joensen hevur farloyvi frá Løgtinginum, er Helgi Abrahamsen tingmaður fyri hann.

Fyri fólkatingssessin fær Edmund Joensen 570.000 krónur um árið. Umframt at flúgva ókeypis fær hann upp til 90.000 krónur fyri bústaðarútreiðslur umframt 72.000 krónur í kostnaðarsamsýning frá Fólkatinginum um árið. Fyri løgtingssessin fær Edmund Joensen slakar 400.000 krónur í ársløn.

Tilsamans er hetta oman fyri eina millión um árið, og her er tað, eg hugsi um sparingar, tá tær raka teir sjálvar sum ráða fyri borgum. Tá verður ikki tosa so hart, tí tað rakar alt ov meint, ja tað pínir í ryggmarvini hjá honun og teimum sum eru í somu støðu sum hann.

Høgni Hoydal er somuleiðis bæði fólkatings- og løgtingsmaður, so vit hava tveir tinglimir, har tað við einum góðum vilja hevði borið til at broytt lógina, so Løgtingið ikki bar farloyviskostnaðin og at tað bar til at mótrokna í inntøkuni, tí talan er um tvinnar árslønir. Eitt er vist og tað er, at í hesum tíðum koma allar sparingar og eykainntøkur væl við hjá samfelagnum.

Løgmaður legði í løgmansrøðu sínari dent á hesi orðini: »AT VÍSA SAMFELAGSSINNI«. So nú er spurningurin, vil partamaðurin hjá løgmanni vísa Samfelagssinni?

Nei einki trúgvi eg uppá, at løgtings- og fólkatingsliminir kunna hava eitt bein í hvørjum leirinum og virka 100% í Løgtinginum og á Fólkatingið.

Eingin kann tæna tveimum Harrum. Sessurin í Fólkatinginum er fulltíðarstarv eftir donskun mátistokki, líkaleiðis er tingsessurin løntur sum fulltíðarstarv hóast áseting er um, at loyvt er at hava upp til hálvt alment arbeiði samstundis. Tann stóri trupuleikin er at siga farvæl til kr 400,000, tað er SVÁRT. Edmund hvar er samfelagssinnið??

Eg haldi, valevni skulu taka støðu til, um tey ynskja at koma í Løgtingi ella á Fólkating, tey skuldu ikki stilla upp til bæði parlamentini.

Best var, um føroysku fólkatingssessirnir vórðu avtiknir, og vit í staðin fingu ein føroyskan umboðsmann, ið talaði sak føroyinga á danatingi uttan atkvøðurætt, og uttan at vit blandaðu okkum í donsk viðurskifti, á sama hátt sum danir hava sín ríkisumboðsmann í Føroyum.

# Danir høvdu onga skuld í kreppuni!

DÁVID ISFELD
Hósvík



Eg var glaður at síggja, at Helgi Abrahamsen kom við síni hugsan og fatan av míni meining, ið bar speirekandi heiti »Tíðindastubbi til Helga Abrahamsen«, tí tað gav mær høvi til at rætta nakrar misskiljingar hjá Helga av greinini hjá mær. Eg veit fullvæl, at har eingi nýggj tíðindi vóru, men tá ið eg havi lisið tað, sum Helgi Abrahamsen og hansara samsintu hava skrivað um blokkin í síðstani, er tað sum um, at tey hava gloymt, hvat fór fram í 80'unum, og tann vitnisburð, ið føroyski húsagangurin fyrst í 90'unum bar fram; nevniliga, at blokkurin og tað, at vera í ríkisfelagsskapi við Danmark, ikki er nøkur trygd fyri føroyska búskapin og vælferðina hjá føroyingum.

**Mína meining um danir skal eg nokk sjálvur siga**
Helgi Abrahamsen gjørdist firtin, tykist mær, yvir mínar neiligu útsagnir um blokkin, sum um eg júst hevði sagt okkurt ljótt um onkran av hansara kæru - blokkurin er altso bert ein peningaligur stuðul. Hetta fekk Helga at siga, at eg gav dønum og blokkinum skyldina fyri kreppuna í 90unum. Hetta er fullkomiliga ósatt. Eg havi ongantíð sagt ella sipa til, at danir høvdu skyldina, ella ein part av skuldini, í kreppuni hjá okkum - og tað haldi eg heldur ikki. Í míni grein segði eg bert, at blokkurin og danskt innlit í føroyskum politikki, ikki garanterar okkara búskap ella vælferð. Tað, at ein donsk ráðgevandi nevnd kom til Føroya árliga, undirstrikar bara mítt argument um, at danir fylgdu betur við fyrr enn nú, og hóast hetta, fóru vit ikki á húsagang, nú globala fíggjarkreppan herjaði - og enn herjar.

**Eingin tilvild**
Eg veit ikki hví Helgi Abrahamsen sigur, at eg í grein míni "spæli við tilvildarlig tøl". Har er als einki tilvildarligt við teimum tølunum. Tølini fyri fyrst í 90unum hava týdning, tí tað var tá, vit fóru av knóranum; tølini fyri 2002 hava týdning tí tað var tá, at vit skóru blokkin úr 980 mió. kr niður í 614 mió. kr; og tølini fyri 2009 hava týdning tí…ja, tað er jú í hesum ári vit liva í. Hesi tøl hava einki við spæl ella tilvild at gera - undrunarvert, at Helgi sigur so.

**Sannleikin um yvirtøku av málsøkjum**
Helgi Abrahamsen vildi eisini vísa aftur umfatandi lutin hjá dønum innan føroysk málsøkir, áðrenn og undir kreppuni. Hann sigur, at: "…flestu málsøki, sum eru yvirtikin tey seinnu árini, vóru í praksis yvirtikin eftir grein 9 í heimastýrislógini longu í 70unum." Hetta er bert ein lítil partur av sannleikanum, tí, sum Helgi sjálvur sigur: "í praksis", ið faktiskt merkir, so leingi danir eru nøgdir við føroyska "praksis" - tað er sanniliga eingin yvirtøka; bert eitt umsitingarloyvi. Í grein 9 stendur bara, at vit hava loyvi at semjast um okkara ávirkan ella yvirtøku av málsøkjum; tað er tað heila.

Aftan á kreppuna yvirtóku vit faktiskt eina rúgvu av málsøkjum: Ráevni í undirgrundini, 1992; síðstu partarnir av málsøkinum telegraf- og telefonmál, 1997; havnir, umhvørvi, skúlamál og almenn forsorg, 2001; trygd á sjónum, 2002; fjølmiðlaábyrgd, lóggávan kring uppboðssøluhaldarar, vaktarvirksemi og løgfrøðiliga hjálp o.a., 2006; tilbúgving og fólkakirkjan, 2007; mát og vekt tænastan, skipaeftirlitið, veðurtænastan og fleiri onnur mál. Satt at siga skilji eg ikki, hví Helgi Abrahamsen sigur, at vit so at siga eingi málsøki hava yvirtikið síðan 70ini, tí tað er beinleiðis ósatt - tak ikki mítt orð fyri tað; vitja www.tinganes.fo.

Helgi Abrahamsen spyr eisini um tit skulu trygva mínum tølum og búskaparvøkstrinum frá 2002 - 2009 upp á 21%. Fyrst av øllum eru hetta ikki míni tøl. Síðani kunnu tit, Helgi og onnur áhugaði, altíð vitja heimasíðuna hjá Fíggjarmálaráðnum og kanna eftir - tað gjørdi eg.